TB-HB:

HB fer eftir steypinum

Talan verður um satt antiklimaks, tá tvøráment fara at siga farvæl við fyrstu deild, samstundis sum HB tekur ímóti gullinum á Tvøroyri.

UPPTAKT
Jákup Mørk

Eingin spenningur er um sjálvan dystin, tá HB vitjar á Tvøroyri í dag, men fyri tað kann roknast við, at stór áskoðarafjøld fer at fylgja við, hvussu leikur fer.

HB hevur nevnliga longu tryggjað sær meistaraheitið, og lítið er at ivast í, at

HB gjørdist meistarar seinasta í vikuskifti, og nú fara teir suður til Tvøroyri eftir gullinum

Smyril verður væl og virðiliga fullfermdur, tá hann leygarmorgunin leggur frá Havnini við kós móti Drelnesi.

HB viðhaldsfólkini hava sum vera man nógv at gleðast um, og tó at liðið til hendan dystin má vera bæði Bárð Johannesen og Nicu Dogaru fyriuttan, tí teir eru leikbannaðir, so munnu tey ikki vera í iva um, at talan fer at gerast um tvey stig.

Hjá TB er støðan júst hin øvugta. Teir hava mangan leikt stórdystir á Sevmýru móti HB, men soleiðis verður ikki hesaferð. Stórtapið fyri Skála sendi teir so dyggiliga niður í aðru deild, og tó at teir helst mugu royna at vaska hetta av sær í dag, so er á ongan hátt víst, at hetta fer at eydnast teimum.

Tvørámenn hava annars allar leikarar tøkar til dystin, sum altso verður tann seinasti hjá liðnum hetta kappingarárið.

B36-VB:

Bara B36 hevur nakað at spæla um

Dysturin í Gundadali í dag snýr seg stórt sæð bara um, hvørt B36 røkkir einum europeiskum plássi ella ikki. Hvørki sigur, javnleikur ella tap flyta VB nakran veg

UPPTAKT
Hilmar Jan Hansen

Tá vágbingar í dag fara á vøllin í Gundadali, kunnu teir spæla so frígjørt, sum teimum lystir, tí teir hava einki at missa. Bara æran er at spæla fyri hjá VB, sum fyri viku síðani vísti tenn og vann á KÍ.

Hinvegin noyðist B36 at gera sítt besta fyri at vinna, samstundis sum ein vón verður sett til, at EB/Streymur á Eiði kann taka stig frá GÍ, ið bara er framman fyri B36, takkað veri roknistykkinum um innanhýsis uppgerðir.

— Tað sigur seg sjálvt, at vit fara at stríðast fyri kjansinum, tí hóast Intertoto Cup-kappingin ikki er tað sama sum Europa Cup og UEFA Cup, er hetta ikki nakað, vit lata fara aftur við borðinum uttan víðari, sigur B36-arin Jens Kristian Hansen.

— Serliga fyri teir ungu spælararnar hevur tað nógv av siga, at teir sleppa at royna seg í europeisku kappingunum, so vit fara á vøllin fyri at vinna og einki annað.

John Petersen og Julian Johnsson, ið báðir blivu útvístir í GÍ-dystinum fyri viku síðani, hava sjálvandi karantenu. Men hinvegin er Jákup á Borg við aftur eftir skaðasteðg, meðan tað eitt sindur ivasamt, um Bárður Mortansson verður klárur.

Unglingar fáa kjansin

VB hevur kanska ikki hevur so nógv at stríðast fyri, so skal B36 ikki ivast í, at vágbingar vilja vísa enn eina ferð, at teir — hóast eitt skuffandi sjeyndaplass — altíð kunnu gera seg galdandi.

— Hjá okkum ræður bara um at fáa ein góðan enda á kappingarárinum, og tað gera vit best við at vinna í Havn, sigur VB-málverjin Bjarni Johansen.

Helst fer hann á vøllin við liðskiparabindinum í dag, nú Eyðun Jacobsen í vikuni fór av landinum. Slobodan Madzar hevur karantenu, men annars hevur VB alt fólkið til taks í dag.

Við í hópinum eru eisini tveir av teimum, sum júst hava vunnið føroyameistaraheitið í unglingadeildini, Símun Samuelsen og Jákup Olsen. Tað boðar bara frá góðum, at vágbingar royna at halda teimum yngru til.

Lítið veiggj í FCK í svenska heystarkuldanum

Burtursæð frá fyrstu minuttunum, so sást einki til íblástur, fyrrenn Todi Jónsson var komin á vøllin

ÚTISETAFELAG
Jóannes Hansen

Síðsti føroyingurin varð í svenska heystarkuldanum hóskvøldið sendur úr Europa Cup kappingini. FCK var í Stokkhólmi, og danska høvuðsstaðarliðið megnaði ikki at standa ímóti Djurgården.

Fyrstu tíggju minuttirnar var FCK nærgangandi. Teir høvdu fimm hornaspørk, og tað var fleiri ferðir um reppið, at teir fingu roynt ímóti málinum.

Tá Djurgården í 13. minutti fekk fyrsta hornasparkið, skoraðu teir við nærra stólpan, og so vóru teir einaráðandi næsta stóra tíman.

Dygst undan steðginum øktu teir til 2–0, og so tóktist tað avgjørt, at tað skuldi verða svenska og ikki danska liðið, sum skuldi halda fram í kappingini. Málið fingu teir eftir fríspark mitt á FCK helvtini. Verjuskipanin hjá FCK kiksaði, og bólturin varð stútaður í kassan.

Djurgården hevði bæði eftir 1–0 málið og í 2. hálvleiki stórar møguleikar at økja um leiðsluna, men FCK slapp við skrekkinum.

Todi væl við

FCK var sera lítið sannførandi. Tá Jörgen Pettersson ikki var førur fyri at spæla, hevði venjarin flutt Zuma fram við síðuna av Peter Møller, og so var Morten Bisgård í høgru. Zuma spruttaði nakrar ferðir, meðan Møller og Bisgård vóru millum teir heilt anonymu.

Todi Jónsson man kenna seg heilt í útjaðaranum í løtuni. Tað var eyðsýnt, at álopinum restaði brodd, og donsk fjølmiðlafólk roknaðu í seinnigongum við, at Todi fór at sleppa framat beinanvegin í 2. hálvleiki. Men Hans Backe helt føroyinginum á beinkinum, inntil smáir tjúgu minuttir vóru eftir, og tað kendist alt meiri greitt, at altjóða leikluturin hjá FCK skuldi vera av á hesum sinni.

Tá Todi kom inn fyri Morten Bisgård, varð Zuma fluttur í høgra borð. Todi tóktist væl upplagdur. Eftir fleiri sneiðingar hevði hann góða skotroynd av brotsteigarmarkinum og eitt sindur til høgru. Stutt eftir varð hann steðgaður í gjøgnumbroti mitt fyri. Mótstøðumaðurin fekk gula kortið, og málverjin megnaði akkurát at benda frísparkinum hjá Peter Nielsen á samankomingina.

Tá tað restaðu tveir minuttir var Todi við í málinum, sum tóktist skula gera síðstu løtuna heilt spennandi. Eftir framspæling Peter Nielsen, lyfti Todi bóltin uppá tvørs. Verjuspælarin Boba Zivkovic, sum stutt frammanundan var innskiftur, smekkaði til, og so var 2–1.

Heimaliðið tóktist eitt sindur skelkað, men bara tveir minuttir seinni avgjørdu teir. FCK gjørdi klossut brotsspark í høgra borði, og so var liðugt.

Flott av Stavanger

Hitt stóra danska felagið, Brøndby, varð eisini sent út í europeiska myrkrið. Á heimavølli megnaðu teir bara 1–1 ímóti Levski Sofia, sum vann fyrra dystin 4–1. OB vann á heimavølli 1–0 ímóti Celta Vigo, men tað var akkurát ikki nóg mikið, tí spanska liðið vann sín heimadyst 2–0.

Einasta danska liðið, sum verður í hattinum, tá lutur verður drigin til næsta umfarið, er FCM. Púra óvæntað megnaðu teir 1–1 í Kroatia ímóti Varteks. Danska liðið vann 1–0 á heimavølli. FCM hevði uppiborið at vinna í Kroatia. Teir spældu seg til fleiri møguleikar í 1. hálvleiki, tá teir misnýttu brotsspark. Í 2. hálvleiki komu teir á odda, og so var neyðugt hjá heimaliðnum at skora trý mál. Teir megnaðu bara at fáa eitt.

Eitt av heilt stóru samrøðuevnunum eftir UEFA Cup umfarið hóskvøldið var, at norska Viking Stavanger, sum ikki hevur staðið seg serliga væl í tippuliguni í ár, sendi enskilsa stórfelagið Chelsea úr kappingini. Teir vunnu 4–2 á heimavølli, og tá London felagið ikki hevði vunnið meiri enn 2–1 á Stamford Bridge, noyddust teir aftur um Norðsjógvin við heilt reyðum oyrum!

KÍ–NSÍ:

Lagt er upp til undirhald í Klaksvík

Venjararnir báðir hava rokkið málunum, sum teir undan kappingarbyrjan settu, men teir vóna, at spælararnir ikki eru so vónbrotnir um FM tapið, at teir ikki fara at geva alt í stríðnum um silvurið

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Soleiðis sum kappingin lagaði seg eftir summarsteðgin, mundu tað vera mong KÍ og NSÍ viðhaldsfólk, sum droymdu um, at gullið fór at standa upp á spæl, tá hesi bæði feløgini í átjanda umfarinum skuldu hittast í Klaksvík.

Í dag skal NSÍ til Klaksvíkar. Gullið er farið til Havnar. HB hevur vunnið tað. At tað varð greitt longu síðsta sunnudag komst av, at bæði KÍ og NSÍ dumpaðu í seytjanda umfarinum.

NSÍ fær í dag fyrstu ferð heiðursmerkir í FM kappingini. So verður spurningurin, um tey vera úr silvuri ella bronsu.

– Vit kunnu ikki annað enn vera nøgdir við kappingarárið. Sjálvandi fara vit til Klaksvíkar fyri at fáa silvurið út aftur við. Vit fara at leypa á, og eg væntí faktiskt, at vit fara at vinna. Undir øllum umstøðum áttu vánirnar at verið góðar fyri undirhaldi, heldur NSÍ venjarin, Jógvan Martin Olsen. Ulrik Balling verður ikki við, og tað verður Kári Hansen heldur ikki. Hann er leikbannaður.

Farvæl við maner

Kurt Mørkøre fer í dag at standa á odda fyri KÍ liðnum fyri síðstu ferð – í hvussu so er í hesum umfarinum. Mánadagin flytir hann til Noregs. Tá vit spyrja hann, hvat felag hann fer at verða knýttur at har yviri, heldur hann beinanvegin fyri, at KÍ verður altíð hansara lið, og tann útsøgnin man glíða væl niður norðuri í Klaksvík.

– Ímóti NSÍ eru vit á heimavølli, og vit fara at leypa á. Undan kappingarbyrjan setti eg mær sum mál, at vit skuldu røkka ímillum trý tey bestu, og so skuldi síðsta stigið á toppin takast komandi ár. Vit eru millum trý tey bestu, men soleiðis sum kappingin lagaði seg, so eru vit sjálvandi vónbrotnir av, at tað ikki eydnaðist at vinna meistaraskapin. Men nú hava vit einki at missa, og eg rokni við, at spælararnir fara at gera sítt ítrasta.

Hjá KÍ er eingin leikbannaður ella skaddur. Ove Nysted var burturstaddur síðsta vikuskifti, men hann hevur vant í vikuni, og hann verður ivaleyst í miðverjuni undir liðini á Alexander Djordjevic.

Eftir dystin í dag bjóðar KÍ øllum í ítróttarhøllina til ábit og hugna.

Ingi hevur givið avboð

Tað kemur illa við, at Arsenal miðvallarin og liðformaðurin á U–19 landsliðnum ikki verður við í EM undankappingini

U–19 LANDSLIÐIÐ
Jóannes Hansen

Í hesum døgum leggur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá U–19 landsliðnum, síðstu hondina á úttøkuna til EM undankappingina. Hon verður í Georgia í tíðarskeiðnum 22. til 26. oktober. Umframt Føroyar og Georgia fara Belgia g Ukreina at luttaka í kappingini.

Venjarin hevur fleiri ferðir tikið til, at talan er um eitt spennandi føroyskt lið, har nógvir góðir og evnaríkir spælarar eru við. Men tá úrvalið ikki er størri, enn tað er í Føroyum, so kann tað vera so skjótt, at avboð hava við sær, at liðið viknar ikki so lítið.

Júst henda støðan hevur nú tikið seg upp. Liðið verður ivaleyst spennadi, men tað kemur sera illa við, at liðformaðurin og ryndasti føroyski spælarin, Ingi Højsted, hevur verið noyddur at geva avboð.

Fyrrverandi B36 og núverandi Arsenal spælarin hevur úr London boðað frá, at hann er ikki tøkur til landsliðsferðina. Orsøkin er herviligur fótskaði, sum hevur plágað hann leingi. Ingi hevur ikki verið førur fyri at venja saman við liðfelagunum, og tískil hava teir í Arsenal og Ingi Højsted ikki mett, at tað var ráðiligt, at Ingi fór til EM undankapping seinni í hesum mánaðinum.

Tað hevur gingið illa at finna fram til, hvør skaðin hevur verið. Men nú hava teir funnið orsøkina, og tað verður roknað við, at Ingi Højgaard skjótt aftur fer at verða førur fyri at venja saman við hinum ungu spælarunum í Arsenal.

U–19 landsliðið verður úttikið eftir vikuskiftið.



Ingi Højsted úr Arsenla er uttan iva stjørnan á føroyska liðnum, og tað kemur illa við, at hann nú hevur givið avboð vegna skaða

Fleiri lyklaspælarar burtur

Tríggir av føstu monnunum vóru ikki tøkir, tá U–17 landsliðið í gjárkvøldið skuldi royna at pynta um vánaligu úrtøkuna í Rumenia

U-17 LANDSLIÐIÐ
Jóannes Hansen

Tað hevur ikki gingið nakað serliga hjá U–17 landsliðinum í Bukarest. Eftir 8–0 tapið ímóti vertunum taptu føroyingarnir mikukvøldið 6–0 ímóti Eysturríki. Vónirnar vóru settar til síðsta dystin, sum var á skránni í gjárkvøldið. Makedonia tapti mikukvøldið 4–0 ímóti Rumenia, sum hevði møguleikar til nógv fleiri mál. Tað sigur Bill Jacobsen, venjari hjá føroyska liðnum.

Men Bill var ikki heilt álvuligur undan dystinum í gjárkvøldið. Jónas Þór Næs og Emil Nolsøe Leifsson vóru so mikið skaddir, at teir ikki fingu spælt í gjár, og Jústinus H. Hansen var leikbannaður eftir gul kort í báðum teimum fyrstu dystunum. Allir hesir hava verið millum lyklaspælararnar.

Ímóti Eysturríki var føroyska liðið rættuliga nógv broytt, um sammett verður við dystin ímóti Rumenia.

– Avrikið í fyrsta dystinum var ikki gott. Tí royndu vit at broyta, og hóast vit taptu 6–0, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 3–0, so var avrikið nakað betur hesa seinnu ferðina, enn tað var ímóti Rumenia. Vit høvdu í 1. hálvleiki tríggjar møguleikar, eitt nú sendi Páll M. Joensen í stólpan. Sammett við spælbýtið so hevði 5–1 til Eysturríki verið meiri passandi enn 6–0, heldur Bill Jacobsen.

Ímóti Eysturríki var føroyska manningin henda: Gunnar Nielsen, Frem – Jónas Þór Næs, Frem – Bogi Hermansen, Frem, Borgar Kristiansen, Skála, Jústinus H. Hansen, NSÍ, Fritleif í Lambanum, ÍF – Jóhan E. Mouritsen, HB (Hartmann Hansen, VB, 60.), Mikkjal T. Hentze, B71, Emil N. Leifsson, liðformaður (Símun Louis Jacobsen, GÍ, 65.), Svenn Dam Jacobsen, HB (Ovi Magnussen, B68, 65.) – Páll M. Joensen, HB.

Seinnapartin av vikuni hevur tað verið gott veður í Bukarest. Tað hevur verið heiður himin og sól, og hitastigini hava verið omanfyri tey tjúgu.